**ISBN 99918-60-03-7**

# Ungdómur og mentanarlig globalisering[1]

Firouz Gaini[2]

*Granskingardepilin fyri Økismenning*
www.region.fo

**NÁMSRIT 6/2005**

*Um námsrit:*
**Námrit eru rit, ið kunnu nýtast sum undirvísingartilfar í føroyska skúlaverkinum, eitt nú í miðnáms- og handilsskúlum. Námsrit eru frágreiðandi lýsingar av samfelagsligum evnum og vera altíð skrivaði á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnaði til útgávu í Námsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).**

---

[1] Upprunaliga sent í Útvarpi Føroya í 2005.
[2] Firouz Gaini er Cand. Scient. Anth. og Ph.D. lesandi á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetur Føroya.

# Innihaldsyvirlit

1. partur ........................................................................................................ 3
2. partur ........................................................................................................ 9

# 1. partur

Eyguni venda ímóti ungdóminum ár 2005. Øll tykjast hava áhuga fyri tí yngra ættarliðinum nú. Tað er ein nýggj støða í Føroyum, tí fyri bara fáum árum síðani var hesin samfelagsbólkurin ikki til at fáa eyga á í almennum kjaki. Hann var ósjónligur, málleysur og uttan virði. Og tó ikki. Kanska var hann meira avbyrgdur enn ósjónligur, tí hann slapp ikki upp í part, tá tey vaksnu kjakaðust. Hann var marginaliseraður. Og var ungdómurin nevndur, so var tað oftast í neiligum fordømandi vendingum. Hann umboðaði ymsar trupulleikar, ið øll, ið ferðast á tí vandamikla óslætta vegnum frá barna- til vaksnamannalívið, stríðast við. Ungdómurin hevði onki gott at bjóða. Ikki fyrr enn hann varð vaksin; ikki fyrr enn hann hevði fast starv og familju, hús og bil. Hann var ein hóttan ímóti teimum ráðandi - teimum vaksnu - og skapti kaos har ordan hevði verið. Hann var ólýðin, kom við nýhugsan, og hevði ringa ávirkan á tey yngstu. Soleiðis var støðan. Ungdómurin var í opnum stríði við tey eldru og royndi at broyta gamlan sið. Hann lurtaði ikki eftir foreldrunum. Men hvat? Samanstoytirnir ímillum ættarliðini eru væl saktans líka fornir sum mannaættin. Sokrates segði fyri 2500 árum síðani, at ungdómurin er dovin, ófólkaligur og tímir ikki at gera nakað til nyttu. Og tá ið ungdómurin er blivin vaksin, so revsar hann tað nýggja ættarliðið av ungdómum sjálvur. Nú er tað hann, sum er á trúnuni. Nú hevur hann helst gloymt, hvussu lívið var áðrenn, hann varð vaksin.

Seinastu árini er ungdómurin, sum sagt, vorðin ein sjónligari bólkur í samfelagnum; hann hoyrist - og sæst. Og kanska tað nú verður lættari at skilja ungdómin. At skilja hvussu hann hugsar, hvørjar dreymar hann hevur, hvørjar myndir hann hevur av sínum landi (og av teimum gomlu - eisini, av sær sjálvum) og hvørjar hugsanir hann hevur um framtíðina. Men so má ein, sum vaksin, eisini læra seg at lurta og spyrja. At seta seg inn í støðuna hjá teimum ungu og tora at sleppa fordómum; at lata ung fáa pláss. Tey ungu eru hóast alt líka ymisk sum øll onnur. Tey hava ymisk áhugamál, fjølbroyttar lívsstílar og ymisk virði. Og ikki at gloyma, ójavna sosiala bakgrund. Men tey hava eyðsæð eisini nógv í felag. Og oftast verða tey, helst av órøttum, koyrd í ein og sama sekk - so at munirnir á einstaklingum ikki eru at hóma. Nógvar litríkar mytur eru um ungdóm. Bæði romantiskar dreymamyndir og ræðumyndir. Ungdómstíðin var tann besta ella ringasta

tíðin í lívinum - alt eftir hvønn ein spyr. Alt eftir hvat ein minnist, hvat ein vil minnast, og hvat ein hevur gloymt.

Vit liva í eini tíð við stórum og skjótum broytingum. Samfeløg og mentanir skifta skap og lit. Mørk verða flutt, múrar hvørva, og nýggir verða reistir aðrastaðni. Heimurin flýtur og ilt er at spáa um framtíðina, sjálvt bara nøkur fá ár fram. Allar hesar broytingar verða settar í samband við sonevndu “globaliseringina” í heiminum. Men sera ymist er, hvussu globaliseringsgongdin verður fatað. Onki er tó at ivast í, at sambandið ímillum lond og heimspartar er vaksandi, at mentanarliga ávirkanin uttanífrá økist, og at ein einsháttað brúkaramentan spjaðist til øll heraðshorn. Globaliseringin kann als ikki hugsast uttan teir nýggju elektronisku miðlarnar (fyrst og fremst alnetið og fartelefonirnar), og tað er ongin loyna, at mentanarlig globalisering fyrst og fremst er brúkaramentan og lívsstílar, ið hoyra henni til. Og altjóða brúkaramentanin hevur sett ungdómin í miðdepilin. Brúkaramentan og altjóða ungdómsmentan ganga, kann sigast, hond í hond. Ungdómurin umboðar tey virði og teir stílar, ið øll onnur spegla sær í. Ungdómurin umboðar ta markleysu globalu framtíðina í miðlum og lýsingum. Talan er um framkomna altjóða marknaðarføring.

Sum sagt, so er heimurin í støðugari broyting – menning – og tosað verður um postmodernaðar ella seinmodernaðar tíðir, har mørkini ímillum lond, mentanir, samfelagsbólkar og politiskar og búskaparligar skipanir gerast ógreiðari, óstøðugari, og harvið torførari at allýsa og avmarka. Øll skulu laga seg til tær nýggju tíðirnar; vera smidlig, søkja avbjóðingar, flyta seg, menna seg, taka egnar avgerðir, leggja ætlanir og reflektera yvir sína støðu. Øll skulu skapa sín egna samleika; byggja ein mentanarligan samleika upp – sum við legokubbum. Men samleikin kann broytast, ella, skal helst broytast. Meiningin er ikki at søkja eitt fast punkt at halda seg til, men at røra seg, broyta seg, finna nýggj áhugamál, savna saman nýggjar upplivingar, fáa fleiri royndir, øðrvísi royndir, forbrúka, ferðast og vera nýskapandi. Spurt verður ikki, um vit ynskja hesar tíðir, hesa tilveru, men tíðirnar eru har, og tú kanst velja at fylgja áheitanum, “trendum” ella at royna at standa ímóti. Tungt er at ganga ímóti streyminum, ikki minst hjá teimum ungu; teimum, ið kanska verða harðast rakt av trýstinum, og sum eisini eru viðbrekin, tí tey standa á einum vegamóti. Tey hava so nógvar avgerðir at taka; so

nógvar leiðir at velja. Tey sleppa ikki undan at velja, og hvat skal ein so velja? Hvat er tað rætta? Hvat passar til mín? Hvat er avleiðingin av einum skeivum vali? Tey ungu verða díkt undir við upplýsingum og lýsingum um lívsstílar, virðir, útbúgvingar, starvsleiðir, frítíðarítriv og so framvegis. Alt kann virka lokkandi og alt kann í prinsippinum eisini veljast.

Men hvussu skal ein seta seg inn í so nógv? Og til hvat? Hvussu skal hetta hanga saman? Nógv av hesum, ið eg nevni her, er galdandi fyri øll í teimum seinmodernaðu tíðunum, óansæð aldur. Tað, sum plagdi at hoyra ungdómstíðini til, er nú fyri alt lívið. Spurningurin verður so eisini, hvar ein skal seta markið ímillum ungdóm og vaksin. Lívfrøðiliga er ikki so torført at seta eitt mark, ei heldur løgfrøðiliga, men mentanarliga og sálarliga! Eyðkennini fyri ungdómstíðina, tá ein hvørki er barn ella vaksin, men stendur í flótandi millumstøðu, á veg úr einum statusi í annan, skal læra og finna "seg sjálvan", er eftirhondini nakað, sum eisini er galdandi fyri nógv vaksin. Málið er ikki longur "bara" at etablera seg. Ein skal helst vera vaksin og ungur í senn. Ein skal liva sum ungdómar, men eisini hava fast starv og familjulív. Tað er ikki lætt at krøkja seg til bæði, nærmast eitt paradoks, og skapar viðhvørt ógvuliga forvitnisligar blandingar av lívsstílum.

Alnetið er ómetaliga týðandi partur av globalu ungdómsmentanunum í okkara tíð. Alnetið sameinir ung úr øllum heraðshornum. Her er eitt forum, ið ikki verður stýrt av handilsligum áhugamálum – í hvussu er ikki beinleiðis – og tað er her tey ungu veruliga hava fingið rúm og rødd. Ikki í teimum vanligu loftmiðlunum, sjónvarpi og útvarpi, tí har eru tað tey vaksnu, ið stýra allari gongdini: fortelja hvat tey skulu tosa um, hvat tey skulu siga og hvør skal sleppa framat. Loftmiðlarnir skapa ofta eitt kjak um ung, sum ung ikki sjálvi kenna seg aftur í, til dømis viðvíkjandi tónleiki, móta og list. Alnetið gevur teimum ungu beinleiðis samband - uttan eftirlit - við umheimin. Her kunnu tey finna upplýsingar um alt, ið hugsast kann og gerast partur av felagsskapum og klubbum. Fáa nýggj sosial netverk og vinir og kenningar úr øðrum londum og fremmandum umhvørvum. Tey sleppa burtur úr lokalsamfelagnum uttan nakrar forðingar. Tey kunnu finna fólk, langt av landi skotin, ið hava somu áhugamál sum tey. Alnetið ger tað møguligt at fáa vitan um og atgongd til "felagsskapir", sum ein annars ikki hevði

kunnað fingið samband við. Nógvir ungdómsbólkar hittast á alnetinum. Her hava vit veruliga globalar ungdómsbólkar, ið ikki hoyra til ávíst landafrøðiligt pláss. Stílar og symbol úr tí "globala" cyberspace verða brúkt at byggja upp nýggjan (persónligan) stíl. Tú velur frítt hvussu tú setur saman lívstílarnar. Til dømis kann ein lurta eftir rapp-tónleiki uttan at neyðturviliga liva eftir hiphop stílinum. Ein kann vera kristin og lurta eftir hardrokk tónleiki. Men ímyndaðir felagsskapir á alnetinum, har ein samskiftir við fólk uttan at nakrantíð síggja tey í veruleikanum hava oftast eitt stutt lív. Tá ein tíð er farin, so finnur ein aðrar felagsskapir á alnetinum.

Øll skulu vera liðilig, fleksibul og ikki binda seg til nakað, ið ein ikki lætt kann sleppa úr aftur, til dømis felagsskapir á alnetinum. Málið er at vera individualistiskur og sjálvstøðugur. Menniskju skulu altíð vera fyrireikað til uppbrot, broytingar, stutt-tíðar upplivingar. Men hóast tað ljóðar gott og gevandi at sleppa at frítt velja sjálvur, at sleppa at vera "øðrvísi", velja hvat ein ynskir at brúka úr globalu mentanarrákunum (ið vit kenna úr sjónvarpi og øðrum fjølmiðlum), so er trýstið sera stórt at fylgja mótanum; at vera sum fyrimyndirnar úr miðlunum og fylgja rákum, ið skjótt fara av móta. Sera skjótt. Horvin í søguna. Avloyst av nýggjum rákum, vørum og stílum. Hjá nógvum hevur forbrúk av brúkaravørum tann størsta leiklutin í skapanini av samleika. Samleikin er úrslitið av einum brúkaramynstri. Tey keypa seg bókstavliga til ein samleika. Útsjóndin er lykilin til samleikan, tað skal síggjast, hvør tú ert. Tíni virðir skulu lesast á klæðunum og frisyruni. Globaliseringin økir um forbrúkið. Sagt verdur eisini, ofta, at ung eru "offur" fyri mentanarligu og búskaparligu globaliseringini. Tey forbrúka, so at siga, mentanir.

Hyggja vit at tí føroyska ungdóminum, teimum, ið eru ung í dag, so eru tey sum heild sera altjóða í stíli og virðum. Eygu teirra venda út um landoddarnar og út um Kongaríkið. Tey taka allan heimin til sín tí verøldin er leikpallur teirra. Tey seta krøv, kanska eisini ov høg til tíðir, tí tey vilja ikki spilla tíð ella orku, og tey vita, hvat tey vilja, ella royna í minsta lagi at vera miðvís. Tey leggja ætlanir, ið tey vóna at fullføra, men broyta eisini meining. Tað er partur av spælinum. Partur av gongdini. Men nøkur hava tað altíð lættari enn onnur, tí tey eru búskaparliga væl fyri og hava sterkan mentanarligan kapital. Mentanarligan kapital, ið opnar dyr og ger tey før fyri at navigera

í tí seinmodernaða samfelagnum. Kapital, ið fær tey at síggja møguleikar. Kapitalurin er vitan, praktisk vitan um, hvussu mannagongdin er. Vitan um hvussu ein fær dreym ella ynski til veruleika, um man hevur pengar og stuðul væl at merkja. Mentanarligi kapitalurin er tann nýggjasta vitanin, ið er galdandi; vitan, ið verður endurnýggjað, ferð eftir ferð fyri at geva úrslit. Ein vitan, ið ofta hoyrir til eina mentan, ella ein verumáta, ið tey vælbjargaðu kenna best, til dømis eina fakliga akademiska barlast úr hægri lærustovni; eitt "mál", ið gevur tign í samfelagnum.

Tey ungu eru djørv, velja sær lívsstílar og verumátar, ið pláss ikki plagdi at vera fyri. Nú sært tú nógvar stílar í landinum, eisini á bygd. Klæðir, verumáti, frítíðarítriv og møtipláss siga hvønn bólk tey ungu hoyra til. Mørkini eru tó ikki so neyv, og nógv flyta seg ímillum bólkar. Vinirnir hoyra kanska eisini til ymsar bólkar. Tey sosialu netverkini fara sostatt út um mørk. Heimið, skúlin og frítíðin eru sosialir kontekstir, ið tú ferðast ímillum, og hvørt pláss hevur sítt serkenda umhvørvi, sínar luttakarar og sínar reglur. Hiphop stílurin er nógv frammi, hevur enntá egnan handil í miðbýnum í Havn. Hiphop er upprunaliga úr USA, amerikonskum ghettoum, men í dag ungdómsmentan kring allan heim. Goth ella gothic stílurin er eisini at síggja. Hann er lættur at kenna aftur, svart oman á svart, ofta piercingar og tungar stúvlar. Tað er, stutt sagt, ikki lætt at síggja á ungdóminum, at hann er føroyskur, burtursæð frá teimum føroysku ullintu troyggjunum og frakkunum, ið síggjast nógv fyri tíðina. Serliga tað nýggja sniðið er nógv frammi, modernað og gamalt í senn, vakurt føroyskt design. Her er eitt gott dømi um, at tær seinmodernaðu tíðirnar, ið nútíðin verður nevnd, eru eyðkendar av eini skoðan aftur í tíð, til røturnar, djúpt aftur í tann lokala mentanararvin, samstundis sum altjóða brúkaramentanin er sera ráðandi. Nýggjur føroyskur rokk tónleikur, til dømis hjá Clickhaze, Eivør, og Týr er eisini ein blandingur av gomlum føroyskum og nýggjum globalum tónum og orðum. Tað lokala er tað áhugaverda í tí globala undirhaldsídnaðinum; men tað lokala mentanarliga verður einfaldað, gjørt til popp, standardiserað, fyri at kunnað útflytast og seljast. Tað fremmanda skal ikki vera ov fremmant. Ein skal hoyra hvat, ið er italskt ella kinversk, uttan at tað er serliga autentiskt. Tað sama er galdandi fyri føroyskt tilfar. Tað er sjálvandi lættari at selja Eivør enn gamlar upptøkur av kingosálmum úr Tjørnuvík, og at selja Týr enn kvæðir.

Kingo hevði verið áhugavert hjá einum sera lítlum bólki av fólki uttanlands, meðan Eivør røkkur út til næstan øll, tí tónleikurin er lættari at skilja.

Globaliseringin og seinmodernaða samfelagið eru eyðkend av, at alt millum himmal og jørð verður blandað saman. Blandað saman til nakað øðrvísi, men ikki ókent. Tann stóri spurningurin verður: hvat er autentiskt? Og hann er ikki nemmur at svara. Leitað verður eftir autensiteti, men ilt er eyðsæð at finna hann, tí globaliseringin røkkur so víða, at ein næstan ongantíð kann vera vísur í, at tað orginala, nýskapandi, veruliga er nýtt. Alnetið gevur okkum atgongd til allan heimin. Hugskot og inspiratión kunnu koma úr øllum heraðshornum. Disney-barnafilmarnir, teir nýggju, eru "amerikaniserað" ævintýr úr øllum heimsins londum, stolið og tillagað altjóða marknaðinum. Lætt at fata, lætt at taka til sín, bleytt og samankókað. Sostatt kann globaliseringin í heiminum eisini sigast at elva til eina mentanarliga homogenisering – einsháttan; eina standard mentan, ið í høvuðsheitum grundar á angloamerikanska mentan. Nógv umtalaða Atlantic Music Event-tiltakið í Norðurlandahúsinum í vár var eitt kopi av Danish Music Awards, ið er kopi av Brit Awards í Onglandi. Um stór tiltøk sum AME líkjast ov nógv øðrum konsertum, so missa tey nógv av sínari tign - óansæð hvussu dýrt og professionelt tiltakið annars er. Hóast tað er torført at skapa nakað nýtt og autentiskt í okkara døgum, so er tað sera týðandi, sum fyrr nevnt, at royna at vera nýskapandi og ikki ganga í gomlum sporum. Ein skal í minsta lagi vísa, at ein roynir tað, tí ongin ynskir at síggja tað sama tvær ferðir. Øll vilja hava nýggjar upplivingar. Og her er tann føroyski ungdómurin nógv frammaligari, meira globalur, enn tey eldru ættarliðini í landinum. Ungdómurin setur hægri krøv. Tað merkir ikki at hann ikki eisini kopierar, men at hann helst er minni stoltur av at kopiera, enn mong onnur eru. Tað hevði verið lættari at kopiera Danish Music Awards, um ongin kendi til tað danska tiltakið, men sera nógv hava danskt sjónvarp í landinum, og næstan øll hava atgongd til alnetið.

Ungdómurin er meira frammi í miðlunum enn hann var fyrr, uttan iva, bæði í undirhaldssendingum, kjaksendingum, og, ikki minst, í lýsingum. Fartelefonir, teldur, klæðir, ferðir, bilar, filmar, tónleikur, telduspøl og so framvegis. SMS í Havn hevur altíð ung í sínum lýsingum. Tey ungu er eyðsæð góðir kundar, tí tey keypa nógv og ofta, og helst tað nýggjasta á marknaðinum. Men øll hava ikki ráð til alt tað, ið lýsingarnar

lokka við. Donsku Ung Rejs ferðirnar eru komnar til Føroyar. Stórar plakatir við sól, sandi, skúmi, diskotekum, øli og dansi skulu fáa ung at keypa ferðir til Spania. Talan er um pakkaferðir, ið eru skræddaraseymaðar til tann koola ungdómin, ið vil "liva lívið". Ferðir har man bara er saman við øðrum ungdómi. Føroya Tele og Kall gera eisini nógv fyri at fáa ungdómin til kundar. Ongin ivi er um, at tey ungu eru gull verd í marknaðarføringini. Tey eru bestu kundarnir. Tey hugsa mest um at fáa tað nýggjasta og besta, hóast tey mangan mangla pengar. Ungdómurin skal liva í løtuni, vera spontanur, brúka pengar og ikki hugsa ov nógv um at spara. Og tað er júst tað handilslívið hevur brúk fyri. Lýsingarnar lokka við deiligum løtum, skemti, romantiskum upplivingum, stuttleika við vinum og so framvegis. Sostatt verður ein vøra, eitt forbrúk, knýtt at einum lívsstíli, einum samleika, og selur sostatt ikki bara eina vøru, ein dreym, men skapar eisini lívsstílar, ið kanska ikki høvdu verið so nógv frammi annars. Ein skal tó vera varin við at siga, at tey ungu bara eru "offur" fyri óndsinnaðum lýsingarherferðum, tí tey ungu læra eisini av at vera brúkarar, av at keypa. Og tey ávirka sjálvandi eisini lýsingarnar. Vit liva í einum brúkarasamfelagi. Globaliseringin økir um forbrúkið, og tað er ilt at steðga gongdini í heiminum. Tey ungu forbrúka, og tað gera øll. Tey eru kræsin, krevjandi og taka ikki alt fyri góða vøru.

## 2. partur

Eyguni venda ímóti ungdóminum ár 2005 og øll tykjast hava áhuga fyri tí yngra ættarliðnum nú.

Tey ungu eru, ikki bara í Føroyum, eitt slag av radara, ið sigur, hvat vit skjótt fara at síggja, hvat framtíðin býður. Tey eru framtíðin, men tey duga eisini betri at fanga alt, ið rørist í samfelagnum í løtuni, og siga hvat, ið fer at yvirliva. Hvat ið fer at seta dagsskránna. Í Føroyum kann ein siga, at tey ungu í dag, uppvaksin við alskyns nýggjum samskiftis-tøkniligum tólum, eru í ferð við at broyta ein hugburð, eina siðvenju, ið vendi blinda eygað til Heimin uttan fyri landoddarnar – uttan fyri Danmark. Ein provinsialisma er hótt av tí nýggja ættarliðnum, tí tey eru líka sterkt ávirkað av sínum javnaldrum heima og úti sum av sínum forfedrum. Tíðirnar tala fyri, tær seinmodernaðu tíðirnar, at ein ikki endurskapar nakað, ein arv frá farnum tíðum uttan at

hesin farmur tykist vera neyðugur og áhugaverdur. Tað er ein spurningur um at velja. Velja at ganga nýggjar leiðir ella at fylgja somu kós, tí onki er avgjørt. At fylgja í sporunum hjá foreldrunum er ongin sjálvfylgja longur. Tað er eitt val, ájavnt øllum øðrum avgerðum. Tann refleksivi moderniteturin inniber, at hvør einstaklingur og hvør bólkur í samfelagnum stendur leysari, fríari mótvegis gomlum reglum og siðvenjum. Talan er hvørki um at royna at týna gamlan sið ella at útiloka nýggjar hugsjónir, men at velja úr báðum.

Modernaða ídnaðarsamfelagið var progressivt, framtakshugað og fyri opnum demokratiskum viðurskiftum, í teoriini kann man siga, tí í Føroyum vóru sterkar leivdir av tí gamla bóndasamfelagnum í øllum tí modernaða tíðarskeiðnum. Og leivdirnar eru har enn. Okkurt er í fer við at hvørva, annað er á veg framaftur. Føroysku klæðini eru nógv vanligari í dag enn fyri okkurt um 20 til 30 árum síðani, og nú hava menn enntá stovnað felag fyri fólk, ið brúka føroysk klæðir. Tað er eitt gott dømi um, hvussu mentanin verður viðgjørd í postmodernaðum tíðum. Modernað fólk við góðum størvum stovna eitt felag fyri føroysk klæðir; klæðir, ið vera nýtt nakrar fáar ferðir um árið. Her verður, aftur, “gott gamalt” tikið fram, sett í ein nýggjan kontekst og gjørt til symbol fyri nakað føroyskt í globaliseraðum heimi. Dømini er nógv um, hvussu vit í dag leita eftir onkrum gomlum at seta upp ímóti øllum tí nýggja og óføroyska, ið kemur uttan úr heimi. Samstundis sum eg sigi, at tey ungu hava heimin sum leikpall, so vil eg eisini siga, at tey leita sum ongantíð áður eftir onkrum føstum “autentiskum” - ektaðum - at halda seg til. At skapa sín lokala samleika útfrá.

Tær seinmodernaðu tíðirnar fara fram og aftur. Vit hava rák og mótrák, nýtt og gamalt, kent og ókent; og alt tykist uppstykkjað, kanska eitt sindur staðarleyst, leysrivið úr sínum upprunaliga konteksti, og harvið, fyri nógv, eisini eitt sindur kunstigt. Miðlarnir hava ein stóran leiklut í øllum hesum, tí tað er har, fólk fáa tað fremmanda inn í stovuna, og tí kann ein eisini siga, at veruleikin villist í miðlunum; at torført verður at skilja ímillum tað fjølmiðlaskapta og veruliga. Franski postmodernaði heimspekingurin Baudrillard fer so langt sum at siga, at menniskju ikki longur vita hvat ið er veruleiki og hvat fiktión. Týski námsfrøðingurin Thomas Ziehe sigur harafturímóti, eitt sindur jarðbundnari, at tey ungu lesa - ella síggja - tann sosiala veruleikan við hjálp av miðla-

brillum, ið tey hava internaliserað við at hyggja í sjónvarp og brúka miðlarnar. Mentanarliga globaliseringin, ið vit eru vitni til, er eyðkend av eini upploysn av mørkunum ímillum miðlar og sosialan veruleika. Livdur veruleiki og myndir úr miðlum skapa ta abstraktu ímyndaðu mentanina.

Hvat kunnu vit so siga um mentanarligu globaliseringina og ungdómin í Føroyum? Hvussu er teirra samband? Høvuðssambandið er, sum nevnt, nýggju elektronisku miðlarnir: loftmiðlar, alnet, fartelefonir. Og sama er galdandi í øðrum londum. Globalar ungdómsmentanir hava, í hvussu er her hjá okkum, sína høvuðskeldu í angloamerikanskari brúkaramentan og hartil hoyrandi undirhaldsídnað. Globaliseringin fer frá nøkrum - og út til nógv. Hon umboðar ikki øll á jøvnum føti. Hvussu nógv kenna til dømis til kinverskar yrkingar ella sangir? Ella myndlist? Ella filmar? Sera fá. Og tað, ið er kent her, er tann parturin, ið er blandaður upp við kendum vestligum tilfari. Tað, ið hóskar til Evropa. (Mulan filmarnir til børn til dømis. Amerikonsk konstruktión av tí “kinesiska”). Tað er tað, ið skal útflytast. Á enskum máli verður sagt mainstream um mentan, ið møguliga er byrjað sum áhugaverd og serlig, egin, men hevur síðan ment seg til at blíva mainstream: tað, ið er blandað, útvatnað og sent út til tann globala marknaðin. Sonevndur “World Music” er eisini blivin til mainstream. Tað er tónleikur úr øllum heiminum, ið er skaptur at selja á altjóða marknaðinum. World Music er tó minni standardiseraður og minni blandaður enn mangt annað úr mainstream mentanarídnaðinum. Tó ber saktans til, serliga um ein dugir at brúka alnetið, at sleppa uttan um mainstream mentanarídnaðin og finna okkurt annað. “Bricolage”, hugtak ið heimspekingurin Lévi-Strauss brúkar, merkir at seta mótstríðandi symbol saman. Tað er at skapa eina “hybrid”. Ungdómsmentan í seinmodernaðum tíðum er í stóran mun at arbeiða við bricolage: klippa og líma saman; brúka ymsar keldur, ymsar mentanir til at sniðgeva nakað nýtt; myndir, symbol, tekin, rørslur, og so víðari úr miðlunum úr MTV og TV3, úr heimasíðum og kjatt-kanalum, úr filmum og tónleiki, úr dansi og list, úr lýsingum og bløðum. Øll royna á sín hátt at vera skapandi.

Ferðir hava eisini stóran týdning fyri nógv. Tey, ið hava ráð til tað, fara uttanlands í ferium, fjakka saman við vinum, vitja vinfólk í fjarskotnum londum. Tað er vorðið lættari og bíligari at ferðast. Og tað er “trendy”. Ferðir geva upplivingar, royndir,

undirhald, skemt og nýtt forbrúk. Tað er ein íløga í upplivingar. Summi uppsøkja eisini spenning, vandar og drama. Tey fara upp á fjøll, ígjøgnum urskógir og so framvegis. Søkja "ektaðar" upplivingar; aftur autensitet. At ferðast er at kenna seg frælsan, at stýra sínum lívi. Tað er eisini partur av einum lívsstíli. Tann hjá fjakkarum, kosmopolittum, heimsborgarum. Tað gevur mentanarligan kapital og tign. Ongantíð áður hava so nógvar lýsingar verið at sæð, ið royna at lokka ung út at ferðast. Vikuskiftisferðir til Danmarkar, konsertferðir til DK og Onglands, pakkaferðir til Suðurevropa, ungdómstúrar við Norrønu, og so framvegis. Øll hava ikki ráð. Luksusvørur eru at fáa sum ongantíð fyrr: møblar, bilar, bátar og ferðir. Tey dýrastu merkini til tey peningasterku. Ferðir til Teilands, BMW bilar, sofur fyri 30 000 krónur, boblubað til húsið.

Forbrúk av serligum vørum og tænastum skal skapa ein serligan samleika, ein samleika, ið hoyrir til tann partin av tilveruni, ið hevur við undirhaldi og frítíð at gera. Bretski ungdómsgranskarin Steven Miles sigur, at "*ung hava hvørki tað støðufesti ella tilfeingi, ið skal til fyri at virka sum væl-búgvin brúkari í einum brúkarasamfelag, tí samfelagið bjóðar allar freistingar uttan tað trygga búskaparliga og sosiala fundament, ið eitt slíkt støðufesti má byggja á*". Onnur vilja vera við, at ung læra um lívið í miðlunum. Danski miðlagranskarin Kirsten Drotner sigur, at tey ungu eru pionérar í forbrúkssamfelagnum. Tey ungu kunnu skipa sínar lívsstílar útfrá myndum úr miðlunum, og tey kunnu kjakast um miðlarnar - finnast at ymsum - fyri at finna útav hvør lívsstílur, ið hóskar teimum best. Tó má sigast, at trýstið á tann einstaka ungdómin er stórt, og valdið hjá fyritøkum, ið marknaðarføra og lýsa ungdómslívsstílar, ovurstórt!

Vit liva í einum flótandi moderniteti, sigur sosiologurin Zygmunt Bauman. Tað, ið stóð fast flytur seg; tað, ið var støðugt, broytist; mørk upployssast; ótætt er ímillum kategoriirnar í samfelagnum; privat og alment flýtur inn í hvørt annað; frítíð og arbeiði smelta saman; tjóðir og statir missa síni serkenni; ung og gomul hittast og ávirka hvønn annan; tað lekur ímillum sosialar og mentanarligar bólkar. Marx og Engels tosaðu fyri hálvaaðru øld síðani um "melting the solids" - smelta alt ið var robust. Men tað er fyrst nú, at siðvenjur og serrættindi veruliga smelta. Tað, ið hevur verið roknað sum "natúrligt" - uttan iva - er ongin sjálvfylgja meira. Kvinnur ger mansarbeiði - og øvugt.

Mansligt verður feminint og øvugt. Kroppsmentan, at dyrka sína útsjónd, er í dag nakað bæði menn og kvinnur, ung og gomul, leggja orku í. Menn kunnu pynta seg, spegla sær, smyrja seg. Metroseksuellan samleika kalla summi hetta fyribrigdi, ið als ikki kann sameinast við eldri norðurlensk macho-virðir. Bodybuilding-umhvørvið, eisini í Føroyum, vísir hvussu nógvir ungir menn hava tikið tey nýggju virðini til sín. Teir brúka tímar hvønn dag at byggja kroppin upp - framman fyri einum spegli. Eitt tíðarkrevjandi arbeiði - ella rættari, ítriv. Kostnaðarmikið er tað eisini. Onki er ógjørligt - í prinsippinum.

Ungdómslívstílar er okkurt slag av dreymafabrikk, ið man strembar eftir, óansæð um ein røkkur á mál ella ei. Onki eitur at røkka á mál, tí ein skal altíð leita, finna, leita aftur, finna, og royna nýggjar leiðir. Tað er ein lívlangur skúli, ið sendir okkum út í líkt og ólíkt. Mentanin er frísett, sigur námsfrøðingurin Thomas Ziehe. Marx tosaði um at fríseta kapitalin. gera hann leysan frá øllum feudalum privilegium og familjubondum. Hann skal stýra sær sjálvum. Tað sama, sigur Ziehe, er nú hent við mentanini. Hon er - í teoriini - leys frá sosialum og lokalum viðurskiftum. Hon hongur í leysari luft. Bara knýtt at einstaklingum, ikki stættum og lokalumhvørvi. Tað er sum ein vøra, ið kann takast niður av hyllini í handlinum. Tú kanst velja hvørja tú vilt “keypa”. Sjálvandi er veruleikin ikki so einfaldur, als ikki, men vit liva óansæð, meira og meira, útfrá eini fatan av, at hetta ber til – at man er óavmarkaður og kann tveita sína sosialu barlast, men hetta er meira hvørvisjón enn veruleiki. Stættarmunir eru ikki lættir at fáa eyga á. Arbeiðsmarknaðurin ger tað torført at skilja ímillum bólkarnar. Men samstundis sær man,meini eg, at ungdómurin fer í tvíningar: ein vælbjargaður, við sterkum mentanarligum kapitali og ein marginaliseraður og veikur.

Tað er torført at gera niðurstøður um ungdómin í Føroyum, tí kanningarnar eru fáar í tali. Eisini skal ein vera varin við at fáa sosiala veruleikan, empiriina, at passa, sum fótur í hosu, til teoriirnar. Tann lokali samleiki er til dømis nógv sterkari í Føroyum enn í nógvum av grannalondum okkara, og tann globaliseraði ungdómurin, ið eg tosi um, hevur, samstundis sum hann hevur “heimin til leikpall”, eitt sterkt tilknýti til sín heimstað. Tað fremmanda - altjóða - í mentan teirra, verður brúkt í einum lokalum konteksti. Globalisering er eitt hugtak, eitt fyribrigdi - ella helst fleiri - og ikki nakað

rúm; ikki nøkur mentan. Tað globala sveimar ikki uppi í luftini, tað er á lokalum plássum ymsastaðni í heiminum. Tað er eitt samband, eitt samskifti, ið knýtir samfeløg saman, fyrst og fremst búskaparliga, partvís mentanarliga, men uttan nakra yvirordnaða ætlan. Uttan nakað endamál. Málið er bara at blíva meira globalur - ella helst eisini at menna heimsbúskapin. Marknaðarbúskapurin skal vaksa.

Sostatt vil eg siga, at tey ungu í Føroyum ikki beinleiðis royna at vera "international", heimsborgarar í klassiskari týðing, men at skapa nakað nýtt í lokalsamfelagnum, og her er talan um bygdir, býir og oyggjar meira enn Føroyar, tí tað lokala og globala hittast heilt niðri í nærumhvørvinum. Roynt verður at fylgja við í øllum tí nýggja, at fáa fatur í nýggjum vørum, stílum og hugskotum, og at brúka hetta heima - í lokalsamfelagnum. Tað er ein øgilig flyting av mentanarligum rákum. Hvønn dag verður kannað hvat, ið er á vási aðrastaðni. Miðlarnir hjálpa okkum at vera dagførd hesum viðvíkjandi. Sambandið úteftir er vaksandi, meðan sambandið aftur í tíð, millum ættarliðini, møguliga samstundis er viknað. Lokalsamfelagið hvørvur ikki, tað missir ikki sín týdning - sum Anthony Giddens og Thomas Ziehe og aðrir ungdómsgranskarar annars vilja vera við - men tað broytist og verður meira knýtt at umverðini. Tað missir eitt sindur av sínum samleika. Tað er ikki longur nøkur eind, ið tey ungu eru avmarkað til, og har tey skapa sína heimsmynd. Globaliseringin og nýggju miðlarnir hava, sum áður nevnt, opnað fyri møguleikanum at sleppa úr tí lokala samfelagnum, at síggja hvat er hinumegin havsbrúnni- hinumegin fjallið. Tað er ikki nakað mysterium longur. Tað eru ongi mysterium longur.

Seinmodernaðu tíðirnar eru eyðkendar av sínum sterku og djúpu mótsetningum, sínum paradoksum og bricolage-arbeiðinum. Putlispælinum, ið hevur fleiri loysnir. Heimurin er mentanarliga og politiskt fragmenteraður. Í modernaðum tíðum varð hugt fram: framstig og menning av skipanini. Samfelagið hevði eitt greitt endamál, eina modernaða verkætlan at arbeiða fyri: tann rationella borgarliga statin við demokratiskum borgarrættindum. Einsháttan innan fyri landamørk. Felags søgu, felags skúla, felags tjóðskaparligan samleika, felags mentan og virði og eina heimsmynd. Í seinmodernaðum tíðum verður eindin, felagsskapurin, upployst og avloystur av nýggjum. Nýggjum, ið fara út um mørk. Felagsskapum - "communities" - hava fólk

altíð brúk fyri, líka nógv nú - sum fyrr. Øll uppsøkja sínar felagsskapir fyri at finna ein tryggleika, fáa hjálp og stuðul, kenna samkenslu, fyri at hoyra til ein bólk, og hava nakað saman við nøkrum. Men, sum áður nevnt, so hava hesir ofta eitt rættiliga stutt lív. Teir eru áhugaverdir eina løtu, mest í byrjanini, blíva kanska ov keðiligir sum tíðin gongur, og so er tíð at finna nýggjar felagsskapir. Tað kann vera innan ítrótt, átrúnað, tónleik, telduspøl, kjatt, fjepparafeløg, easy-living, slow-food matgerð, new-age, økologi og so framvegis. Men helst skal tað vera lætt at sleppa úr bólkinum. Nær og hvar sum helst. Ein møtir upp, tá ein hevur hug. Brúkar felagsskapin, bólkin, tá tað tykist neyðugt. Alt verður lagað til tey persónligu ynskini. “Hetta eri eg - akkurát nú”. Kanska í morgin. Men ivasamt um eina viku.

Zygmunt Bauman sigur í bókini “Community”, at vit ynskja okkum bæði tryggleika og frælsi, men at hesi bæði fyribrigdi illa kunnu sameinast. Hetta skapar eitt dilemma, eina tvístøðu, sum ein ikki kann venda eyguni burtur frá. Tvístøðu ímillum tryggleika og frælsi, millum felagsskap og individualismu. Hvussu nógv vilja vit avmarka okkara frælsi? Ella, hvussu nógv frælsi tora vit at ogna okkum? Ungdómurin er í dag, í líka stóran mun sum fyrr, partur av størri ungdómsbólkum. Bólkarnir eru bara meira flótandi enn fyrr. Tosað verður oftari um lívsstílar enn ungdómsmentanir - tí ungdómsmentan - ella lutmentan - ljóðar ov statiskt og ófleksibult til samtíðina. Lívsstílur er eitt meira dynamiskt, liðiligt hugtak. Tað hyggur at einstaklinginum, samleika hansara, og hvussu hann velur at liva. Lívsstílar síggjast í miðlunum. Teir eru, sum nevnt, í stóran mun ein vøra, ið verður marknaðarførd í miðlunum. Lívsstílar eru minni knýttir at stætt og sosio-økonomiskari bakgrund enn ungdómsmentan. Lívsstílar eru samansettir og siga nakað um sambandið millum einstaklingin og samfelagið, eitt dynamiskt samskifti, ið alla tíðina fer fram. Eitt slag av samráðingum, har einstaklingar royna at finna eina loysn á spurningum, ið hava við persónligan og mentanarligan samleika at gera. Lívsstílar skapa bólkar, har fólk hava nøkur felags-eyðkenni: viðvíkjandi atferð og verumáta, brúkaramynstur og frítíðarítriv. Og hesi eyðkenni, hesi mynstur, eru oftast við til at lýsa ein samleika, ið skilir bólkin frá øðrum bólkum. Tað serkenda skapar eina frástøðu frá øðrum lívsstílum.

Eg havi í hesum báðum fyrilestrunum roynt at lýsa tann føroyska ungdómin við støði í nøkrum hugtøkum, ið eru nógv frammi í samfelagsgranskingini í dag. hugtøk, ið eru torfør at allýsa. Umstrídd hugtøk, ið eisini verða brúkt í gerandismáli. Globalisering - lívsstílur - samleiki - brúkaramentan. Samleiki er kanska tað hugtak, ið flest kjakast um fyri tíðina. Hvat er samleiki? Hvat kann samleikin fortelja okkum? Hann sigur nakað um hvat, ið er felags og hvat ið er persónligt, og skapar einstaklingar og bólkar, individ og samfeløg. Samleikin gevur okkum meining og setur viðurskifti í perspektiv. Hann er, kann kanska eisini sigast, okkara sýnisgluggi. Okkara pláss. Sigur hvussu vit uppfata okkum sjálvi - eins og hvussu onnur eisini uppfata okkum. Samleiki, sum hugtak, er næstan ikki til at fáa fatur á, tað glíður úr hondunum. Kanska hugtakið hevur mist eitt sindur av síni meining, sínum virði, tá tað gerst so ókonkret og sveimandi, sum tað nú er. Tað er vert at tosa um, men torført at brúka. Zygmunt Bauman sigur, í áðurnevndu bók "Communities", hetta um felagsskapir í seinmodernaða samfelagnum: "*Í hesum heimi, ið við stórari ferð verður globaliseraður, eru vit øll bundin av hvørjum øðrum. Og vegna hendan bundinskap kunnu vit ikki, hvør sær, vera harrar yvir lagnu okkara. Hvør einstaklingur fær uppgávur, ið ikki kunnu viðgerast og loysast individuelt. Alt, ið skilir okkum frá hvørjum øðrum, og fær okkum at halda frástøðu ímillum okkum, ið fær okkum at skapa mørk og girðingar, ger hesar uppgávur enn tyngri.*" Vit eru við øðrum orðum, sambært Bauman, noydd at brúka ein bólk, eitt samfelag, at loysa uppgávurnar saman við. Ella, tey flestu av okkum eru. Vit mugu hava yvirlit yvir umstøðurnar, vit liva undir. Uppgávur kunnu, sigur hann, best loysast í felagsskapum.

Eyguni venda ímóti ungdóminum ár 2005. Øll tykjast hava áhuga fyri tí yngra ættarliðinum. Og tað er bara gott. Tað er viðkomandi at kjakast um ungdómin. Viðkomandi fyri øll. Tí vit liva øll í sama samfelagi. Verða øll ávirkað av teimum nýggju tíðunum, nýggju rákunum, elektronisku miðlunum og mentanarligu globaliseringini. Vit kunnu so at siga betri skilja okkum sjálvi, um vit royna at skilja tey ungu. Tey eru í meldurstreyminum, vit hyggja at. Tey hava bæði beinini trygt í tí seinmodernaða samfelagnum. Tey ræðast ikki altjóða rák, fragmenteraðar myndir og provokerandi lívsstílar. Frástøðan ímillum ættarliðini er eisini ein frástøða í tíð. Misskiljingar, ið standast av at hoyra til ymisk tíðarskeið við ymsum virðum og stílum. Og miðlarnir - alnetið, sjónvarpsstøðirnar, bløðini - spjaða brúkaramentanina, tann stóri

vinnaran í globaliseringsgongdini, til alla klótuna. Mentanarlig globalisering er ikki bara forbrúk og undirhald, marknaðarføring, keyp og søla; tað er eisini at endurskapa lokalu mentanina. At hyggja horisontalt - heldur enn vertikalt, út í heim, heldur enn aftur í farnar tíðir, og duga at fáa nakað gott burturúr. Tað er her ungdómurin stendur, og hann er ikki í vanda. Vandin liggur í at ikki taka hann í álvara. At ikki sleppa fordómum og at óttast og ræðast nýggjar siðir, nýggjar stílar. Álit hevði verið hóskandi her, tí globaliseringin á tí mentanarliga pallinum er ikki verri enn tað vit sjálvi gera hana til. Ungdómurin tekur ikki alt “fremmant” fyri góða vøru. Hann velur út, so vítt tað ber til. Trýst og móttrýst, rák og mótrák, alt er uppá spæl. Tak onki fyri givið, men tak ungdómin fyri fult!